# Studningur til fótbóltsvenjing

**Vestmanna:** Hóast vestmenningar munnu vera meiri kendir fyri hondbólt enn fótbólt, so er tað kortini ein sannroynd at fótbóltur verður spældur í bygdini.

Á fundi í Vestmanna bygdaráði í farna mánaði var eitt mál til viðgerðar um at veita fíggjarligan stuðul í samband við fótbóltsvenjing í bygdini. Umsóknin var frá FS-Vágum.



*Vestmanna kommuna játtað stuðul til fótbóltsvenjing*

Fíggjarnevndin mælti til, at geva felagnum loyvi til ókeypis at brúka fimleikarhøllina til venjing. Samstundis við hetta játtaði býráðið 4.500 kr. í stuðli í hesum sambandi.

Bygdaráðið tók einmælt undir við hesum uppskotinum.

**sb.-**

# Fótbóltshøllin liggur best á Kambsdali

**Klaksvík:** Sum væntandi var samtykti Klaksvíkar býráð, at besta staðið til ætlaðu fótbóltshøllina í Eysturoy er á Kambsdali.

Málið hevur verið til umrøðu í fleiri kommunum í Eysturoynni, og tykist semja har at vera um, at henda høllin liggur best í Skálafirði.

Í Klaksvík er støðan hin øvugta, tí har ynskja tey eina plasering sum liggur nærri býnum – í hesum førinum á Kambsdali.

Kommunan ynskir tí, at ein fer at kanna nærri um høllin kann liggja her. Og hetta varð so samtykt á býráðsfundinum herfyri.

**sb.**

## Ársroknskapur 2005

### Rakstrarroknskapur

| 1000 kr. | 2005 | 2004 |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur v.m. | 17.031 | 17.708 |
| Rentuútreiðslur v.m. | 4.511 | 4.467 |
| **Netto rentuinntøkur** | **12.521** | **13.241** |
| Vinningur av partabrøvum | 81 | 479 |
| Kostnaður og provisjónsinntøkur | 2.293 | 2.139 |
| **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **14.895** | **15.859** |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra | 664 | -2.754 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 200 | 138 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **15.758** | **13.243** |
| Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | 14.300 | 13.301 |
| Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum | 323 | 196 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 0 | 0 |
| Tap og burturleggingar | 428 | 1.350 |
| Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum | 75 | -956 |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | **782** | **-2.560** |
| Aðrar óvanligar inntøkur | 0 | 0 |
| Aðrar óvanligar útreiðslur | 0 | 0 |
| **Úrslit av vanligum rakstri undan skatti** | **782** | **-2.560** |
| Skattur | -224 | 445 |
| **Ársúrslit** | **558** | **-2.115** |
| **Býti av rakstrarúrsliti** | | |
| Ársúrslit | 558 | -2.115 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 36.984 | 37.900 |
| Flutt frá øðrum grunnum | 1.200 | 173 |
| **Til nýtslu** | **38.743** | **35.958** |

### Fíggjarstøða 31. desember

| 1000 kr. | 2005 | 2004 |
|---|---|---|
| **Ogn** | | |
| Kassapeningur og ogn uttan uppsøgn í tjóðbankum | 9.086 | 11.898 |
| Ogn hjá fíggjarstovnum | 14.396 | 11.848 |
| Útlán | 313.255 | 270.178 |
| Lánsbrøv | 30.443 | 57.536 |
| Partabrøv | 5.275 | 4.166 |
| Kapitalpartar í associeraðum fyritøkum | 1.708 | 892 |
| Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum | 2.960 | 2.502 |
| Ítøkiligar ognir | 4.789 | 3.256 |
| Aðrar ognir | 360 | 583 |
| Tíðaravmarkingar | 1.086 | 879 |
| **Ognir tilsamans** | **383.357** | **363.738** |
| **Skuld** | | |
| Skuld til fíggjarstovnar og tjóðbankar | 5.283 | 1.045 |
| Innlán | 334.151 | 318.858 |
| Onnur skuld | 455 | 1.038 |
| Tíðaravmarkingar | 0 | 0 |
| Avsetingar til skyldur | 830 | 800 |
| Eftirsett kapitalinnskot | 4.000 | 4.000 |
| **Eginogn** | | |
| Ábyrgdarapeningur | 1.095 | 1.013 |
| Grunnar | 0 | 1.200 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 36.984 | 37.899 |
| Flutt frá ársúrsliti | 558 | -2.115 |
| **Eginogn tilsamans** | **38.638** | **37.997** |
| **Skuld tilsamans** | **383.357** | **363.738** |
| Tøl, sum ikki eru við í fíggjarstøðu | | |
| Ábyrgdir o.a. | 2.715 | 3.780 |

SUÐUROYAR SPARIKASSI

REPROZ




Fyri at betra tænastuna hevur Landsverk fingið *eitt* høvuðsnummar fyri alt landið.

Nýggja telefonnummarið er

340 800

Tel 340 800, Faks 340 801
Koyrilíkindir 340 802
lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK
*byggir land*